# úr klettinum



*Føroyska ferðalagið fekk nógv burtur úr ferðini.*



*Nógv kend støð vórðu vitjað á ferðini í oktober mánaði í ár*

har alt kulmineraði við líðing hansara og deyða.

- Eg biði bara um, at mín kristna trúgv ongatíð verður innkapslað í ein æventýrheim ella í eina romansu, men altíð má vera ítøkilig og hava jørðforbindilsi, sigur Jógvan.

### Svár og trupul støða

Tann eina dagin tey vitjaðu í Betlehem, vitjaðu tey á tí kristna universitetinum. Hóast kristin fólk kring allan heimin kenna býin, er als ikki at meta sum nøkur glæstriborg, hóast mong kanska halda tað.

Her fingu tey eitt gott prát við rektaran á skúlanum og fingu eyguni upplatin fyri viðurskiftunum millum jødar og arábar, og eitt heilt annað innlit í støðuna hjá teimum kristnu, sæð við palestinskum eygum.

Rektarin vísti á týdningin av, at vit kristnu eisini máttu duga at síggja støðuna hjá palestinum: Tey hava mist sítt land og síni rættindi, og liva á mangar mátar sum flóttafólk.

- Fyri hann var tað sera umráðandi at vísa á, at tað er altíð ein trupul støða at vera flóttafólk í egnum øki, og so var líkamikið hvør ið eigur ella átti landið. Eitt flóttafólk er altíð eitt flóttafólk, og ein slík støða er altíð svár hjá teimum.

- Hansara ynski var tí at fáa í lag ein dialog millum palestinar og teir kristnu jødarnar. Hesin boðskapurin og henda áheitanin hóskaði sera væl til ta høgtíðina, sum nú stendur fyri framman – henda boðskapin um frið á jørð og í menniskjum góður tokki, slær biskupur fast.

Eitt annað stórt upplivilsi hjá føroyska ferðalagnum var at vitja tann so vælkenda Grátimúrin.

### Bíðan ella fagnan

Grátimúrurin ella Vesturmúrurin er at finna í gamla býarpartinum í Jerusalem, og verður á mangar mátar mettur sum heilagasta staðið í jødadóminum.

Navnið sjálvt vísir til klagurnar hjá jødunum við múrin um oyðingina av templinum. Fyri mong er hetta eitt stað, har fólkið hevur kunnað grátið og kært sína neyð upp gjøgnum tíðirnar, men hetta er somuleiðis eitt stað har fólk kundu koma fyri at veita tøkk.

- Tað var ein sera stór løta at standa her við Grátimúrin, sigur Jógvan. – Her kundi ein líkasum trína inn í ein størri samanhang og verða ein partur av trupulleikunum í Miðeystri og í bíbilska heiminum.

- Her stóðu jødar sum framvegis bíða eftir Messiasi. Her stóðu fólk úr fremmandum londum og við aðrari trúgv enn okkara. Og her stóðu samstundis 40 føroyingar sum fagnaðu hesum sama Messiasi.

- Vit vóru komin higar, júst tí at Jesus longu var komin til jarðar sum heimsins frelsari. Å, den munur!!

Hetta var kortini ikki einasta nýggja hugsanin sum føroyska ferðalagið mátti taka støðu til – ella kanska taka upp til nýggja viðgerð.

### Katólsk fobi

Innan kristindómin hevur ein verið sera varin við at tosa ov nógv um týdningin av Mariu, móður Jesus.

- Ein kann siga tað so, at av berum ótta fyri katolikkum hava vit nærum sett Mariu til viks eitt sindur. Trupulleikin er bert tann, at hava vit fyrst parkerað Mariu, so verður alt tað sum eitur Mariu-teologi so óviðkomandi og sekunder, slær Jógvan fast.

Hann er sjálvur sannførdur um, at ein í teirri kristnu fjøldini átti at steðgað eitt sindur á og veruliga sæð týdningin av teirri tradisjonellu myndini við Mariu og Jesus-barninum í fanginum.

Henda myndin ella ikonin var rættiliga nógv at síggja í Ísrael, og í Bíbliuni verður eisini sligið fast, at hon var sæl og at hon var útvald av Gudi sjálvum til hesa tænastuna.

- Vit eiga ikki at hava eina katólska fobi, men eiga heldur at lata eyguni upp fyri tí veruleika, at Maria er meiri enn aðrar kvinnur, av teirri einfaldu orsøk at hon var móðir Jesus.

- Hetta hevur týdning fyri okkum, og hevur ikki minst týdning fyri Jesus og hansara samleika: At hann var sonur eina jødiska kvinnu og at hann tí sjálvur er jødi.

- Hugsa vit so víðari til deyða hansara á Golgata 33 ár seinni, tá hann sigur við Jóhannes at "sí, har er móðir tín", so verður tann intima móðurrollan víðkað til viðurskifti millum móður og son á heimsstøði.

- Tí skalt tú hava eina heimsmissión so má hon byrja onkustaðni. Kristindómurin er nevniliga ikki bert ein hugsan ella ein lívsáskoðan, men eisini ein persónlig relasjón og ein persónur – Jesus – sum vit kunnu hava okkara persónligu viðurskifti við.

Út frá hesum persónligu relasjónunum kunnu fólk eisini fáa ella hava persónligar relasjónir mótvegis øðrum fólkasløgum. Hetta gjørdist føroyska ferðalagið vitni til, tá tey vitjaðu Holocaustsavnið í Jerusalem.

### Flógv hjørtu

Hetta savnið lat upp í 2005, og við hetta høvið vóru statsleiðarar úr mongum ymiskum londum við til hátíðarhaldið, millum annað danski forsætisráðharrin, Anders Fogh Rasmussen.

Á savninum var týðiligt at síggja, at mong fólk kring allan heimin hava og hava havt eitt stórt hjarta fyri ísraelska fólkinum. Millum hesi fólkini teljast danir. Her var týðiligt at síggja, hvussu stórt arbeiði danir gjørdu til tess at bjarga flýggjandi jødum til Svøríkis undir krígnum.

Dømi vóru um, at danir stúvaðu eini 10 fólk í eina lítla jollu og flutt tey til frælsið hinumegin Oyrarsund. Hetta var eitt ótrúligt bragd, sum nógv eru sera takksom fyri enn í dag.

- Á hesum savninum var serliga ein setningur sum talaði nógv til mín: "Summi hjørtu eru sum steinar, men roynast kortini flógv. Men tað finnast eisini tey hjørtuni, sum tykjast flógv, men sum roynast sum steinar tá á stendur". Hetta eru sera djúp og viðkomandi orð.

- Júst hetta fingu jødarnir eisini at sanna undir seinna heimsbardaga. Hetta var eisini eitt fullgott prógv um at ein kann verða "ladt i stikken" av sínum egnu, meðan ein fær størstu hjálpina frá teimum, haðani ein minst væntaði tað!



*- Vit eiga ikki at hava eina katólska fobi, men eiga heldur at lata eyguni upp fyri tí veruleika, at Maria er meiri enn aðrar kvinnur, av teirri einfaldu orsøk at hon var móðir Jesus, sigur Jógvan Fríðriksson*

## Amerikanska vápnalógin herd

Fyri fyrstu ferð í meiri enn tíggju ár eydnaðist tað at fáa meiriluta í amerikonsku Kongressini fyr at herða vápnalógina. Men broytingin er heldur ikki stór

Hóast fleiri ungfólk og lærarar eru skotin á amerikonskum lærustovnum í ár, hava amerikanskir politikarar sera ilt við at avmarka rættindini hjá fólki at eiga skotvápn. Teir flestu vísa á tann grundlógartryggjaða rættin hjá fólki at eiga skotvápn.

Men í gjár samtykti Kongressin eina lógarbroyting, sum skal forða fyri, at sinnissjúk fólk kunnu keypa sær vápn. Samtyktin er beinleiðis avleiðing av tilburðinum í vár, tá ein næmingur skjeyt 32 fólk á Virginia Techskúlanum, áðrenn hann beindi fyri sær sjálvum. Aftaná kom fram, at ein dómari hevði sagt mannin vera vandamiklan, men at hetta ongantíð bleiv skrásett í tí yvirlitinum, sum vápnasølur skulu hyggja í, áðrenn tær selja vápn.

Í dag eru umleið 250 milliónir skotvápn í USA, og á hvørjum ári doyggja 30.000 amerikanarar av skotsárum.